## Keypt skrivstovu fyri sjey milliónir

Tórshavnar Kommuna hevur keypt skrivstovubygningin hjá Advokatskrivstovuni í Fr. Petersensgøtu í Havn fyri sjey milliónir krónur. Advokatskrivstovan flytir í nýggj hølir á Frúutrøð í gamla bygningin hjá P/F Robert Brockie. Kommunan skal brúka bygningin til fyrisitingina, men enn er ikki greitt, hvør deild, skal flyta í bygningin – men talan kann t. d. gerast um Sosialu deild. Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at hetta ikki er endaliga avgjørt, men tað verður í øllum førum ein deild, sum er væl egnað at vera undir sama taki, sigur hann.



## Heystframsýning á Oynni

Gallarí Oyggin á Tvøroyri hevur í hesum døgum heystframsýning. Umframt gallarí eigaran Palla Julsgart, ið sýnir oljumálningar fram, so verða eisini Pól Skarðenni við, hann sýnir somuleiðis oljumálningar, og Stig Kalsing sýnir bronsustandmyndir. Gallaríið er opið frá kl. 14-18 ella eftir avtalu. Framsýningin lat upp týsdagin 28. august og opið er til hósdagin 20. september.

# Bjarni Djurholm skal standa til svars fyri gomlum tunlum

Landsstýrismaðurin í vinnumálum skal nú greiða tinginum frá, hví politiski myndugleikin framvegis góðtekur, at Hvalbiartunnilin og aðrir eldri tunlar, ikki verða dagførdir

Tað er Jenis av Rana, sum nú fer at spyrja Bjarna Djurholm, hvussu tað ber til, at Hvalbiartunnilin og hinir gomlu tunlarnir ikki vera dagførdir.

Hvalbingar hava vísta á, at teir hava gjørt kanningar, sum vísa, at Hvalbiartunnilin lýkur fá ella ongi av teimum trygdarkrøvum, sum nú verða sett til tunlar og samstundis er hann so lágur, at hann forðar fyri vinnuliga virkseminum á plássinum. Jenis av Rana vil hava at vita, um Bjarni Djurholm er samdur við hvalbingum og hann vil hava at vita, hvussu politiski myndugleikin verjir slíkar tunnilsumstøður, og um hildið verður, at tað er ráðiligt at brúka slíka farleið.

Løgtingsmaðurin vil eisini hava at vita um aðrir eldri tunlar eru í somu støðu sum Hvalbiartunnilin og um teir lúka nútíðar trygdarkrøv.

Kanningar, sum hvalbingar hava gjørt, staðfesta, at, tað eru ongi ljós í honum og merkingin er ófullfíggjað. Har er ongin ventilatión og ongin trygdarútgerð yvirhøvur, eitt nú telefon, eldsløkkingarútgerð, gassmátitól, mátitól fyri sýni, neyðsamband, radiosamband, fartelefonsamband og vendipláss.

Vatn rennur á vegbreytini, so er vegurin frystur um verður sera hált, samstundis sum ein krappur bogi er í vegnum beint uttan fyri norðara munna. Eisini hanga stórar glerpípur undir loftinum, tá frost er, til stóran vanda fyri bilar og ferðandi. Gjøgnumtrekkurin er vánaligur, so nógv gass hópar seg upp og sýnið vánaligt, tá nógv ferðsla er. Og kemur eldur í inni í tunlinum, er ongin útgerð at stýra eldinum, onki at sløkkja eldin við, ongir møguleikar at boða frá eldinum og ongin útgerð sum forðar øðrum bilum at koyra inn í tunnilin.

Hvalbingar hava eisini skipað fyri gassmátingum, sum vísa, at konsentratiónin av vandamiklu gassunum, er viðhvørt fimm ferðir so høg, sum hægsta mark, ið norska arbeiðsum-hvørvislógin ásetur. Dagar, tá ið nógv ferðsla er, ger hetta tað beinleiðis heilsuskaðiligt og lívshættisligt, skuldi steðgur kemur í ferðsluna.

-áki-



*Hvalbiartunnilin og hinir gomlu tunlarnir lúka at kanna ongi trygdarkrøv og nú vil Jenis av Rana hava at vita, hvussu leingi politiska valdið við góðtaka støðuna*

## Løgmaður til Hetlands

**Um eina góða viku fer løgmaður til Hetlands at tosa um varandi orku, flutning og ferðavinnu**



Á Hetlandsferðini skal løgmaður hitta starvsfelagarnar í oyggjasamfeløgunum fyri sunnan, tað eru stjórnarleiðararnir í Hetlandi, í Orknoy og í Suðuroyggjum, skrivar Shetland Times í morgun.

Hetta er triðju ferð at teir fýra stjórnarleiðararnir hittast at tosa um viðurskifti av felags áhuga

Áðrenn løgmaður kemur heimaftur, skal hann seta eina norðuratlantiska ráðstevnu um varandi orku í fjarskotnum økjum.

-áki-

# Vil hava greið boð um Sandoyartunnilin

**Páll á Reynatúgvu vil nú hava greitt at vita, hvørjar ætlanir samgongan hevur um Sandoyartunnilin og tey boðini vil hann hava frá sjálvum løgmanni**

SANDOYARTUNNIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Páll á Reynatúgvu vil nú hava greið boð frá samgonguni um, hvørja lagnu ætlaði Sandoyartunnilin fær.

Tí fer hann nú at biðja sjálvan løgmann, ið er ovasti ábyrgdarhavari fyri politikkinum hjá samgonguni, greiða løgtinginum frá, hvørjar ætlanir samgongan hevur á økinum.

Tað er í kjalarvørrinum á kjakinum seinastu tíðina, har summir politikarar hava róð framundir at útseta tunnilin, at tjóðveldismaðurin av Sandi nu vil hava greiði á málinum.

Tí vil hann hava greið boð um, hvørjar ætlanirnar eru, nær verklagslóg um tunnilin verður lagdur fyri tingið, nær arbeiðið byrjar og nær tunnilin verður liðugur. Og at enda vil hann hava at vita, hvussu tunnilin skal fíggjast.

Hann heldur, at kjakið, sum hevur tikið seg upp um Sandoyartunnilin, hevur hevur loypt ótta á fólk, sum hava sett búgv, ella eru um at seta búgv í Sandoy.

- Ein órógvað tunnilstilgongd, sum allir Sandoyingar hildu lá í tryggari legu, er nú um at taka grundarlagið undir veikasta økissamfelagnum í landinum, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hann vísir eisini á, at Løgmaður hevur fleiri ført fram, at undanfarna samgonga bygdi Vágatunnilin og Norðoyatunnilin og at hendan samgongan skuldi samtykkja Sandoyartunnilin.

## Royna aftur at strika skattalættan

Tjóðveldisflokkurin ger nú eina roynd afturat at strika skattalættan. Samstundis vil flokkurin hava ein búskapargrunn

Tjóðveldisflokkurin fýlist harðliga á búskaparligu gongdina, tí flokkurin heldur, at tað er alt ov nógv ferð á búskapinum.

Tí fer flokkurin einaferð enn at leggja uppskot fyri løgtingið um at strika skattalættan fyri næsta ár fyri at tálma gongdini.

Hetta er triðju ferð, at flokkurin leggur uppskot fyri løgtingi um at strika skattalættan næsta ár. Samstundis fer Tjóðveldisflokkurin eisini at leggja uppskot fram um at stovna ein búskapargrunn.

Næsta ár verður skattalættin 85 milliónir og at strika hann hevði munað eina mest í royndunum at køla búskapin, sigur flokkurin í tíðindaskrivi.

Hinvegin skal búskapargrunnurin brúkast til at gera okkum leys av blokkstuðlinum og til at skapa langtíðarjavnvág í føroyska búskapin.

Endamálið er at seta peng í grunnin í góðum tíðum og harafturat skulu serinntøkur setast í hann, so at avkastið kann koma næstu ættarliðunum til góðar.



*Tjóðveldisflokkurin heldur, at skal búskapurin kølast, eru hyggjuráðini at strika skattalættan, sum samgongan ætlar at lata næsta ár*